## DAGSINS MEINING

# Todi og landsliðið – vit mugu hyggja frameftir

Føroyingar hava nú í eina tíð verið í serstøkum fótbóltshýri. Seinastu dystirnir móti Íslandi og Týsklandi í fótbólti hava av álvara sett fótbólt og Føroyar á dagsskránna. Ikki minst hevur hetta økt um áhugan heima fyri hesum edla spæli. Neyvan nakrantíð hevur tað eydnast at savna so nógvar føroyingar um eina felags søk sum tá vit stríðast á vølli móti mætum fótbóltstjóðum. Hóast smærri tap so kenna vit tað kortini sum um at vit hava vunnið nakað, eitt nú gott umdømi og áhuga í útlandinum. Vit vóna, at úrslitini kunnu vera við til at lata upp vindeygu fyri okkum í umheiminum.

Og bert fáar dagar eftir hesi frægu úrslit, skapar felagið hjá einum av okkara bestu fótbóltsspælarum nakrantíð, Toda Jonsson eina støðu, sum eisini – óbeinleiðis í fyrstu atløgu - kann koma at gagna føroyskum fótbólti og okkara umdømi úti í heimi. Ein sigur komandi sunnudag til FCK kann nevniliga gerast atgonguseðilin hjá hesum eina av okkara frægu spælarum til altjóða fótbóltsverðina.

Tað er tó eingin loyna, at fólk eru ymisk á máli um leiklutin ella manglandi leiklutin hjá okkara fræga Toda Jonsson. Vit hava sæð greinar og úttalilsi frá fólki, sum hava verið sera ónøgd við, at hesin spælarin ikki vildi vera við á okkara tjóðarliði, landsliðnum. Tað eru so tey, sum halda, at hann eigur sjálvur at gera av, um hann skal spæla fyri okkara landslið. At vit sum samfelag kunnu ikki krevja av einum spælara sum Toda, at hann skal kenna seg tvungnan at spæla fyri Føroyar.

Sannleikar eru helst at finna í báðum hesum sjónarmiðum. Hvat kann ein so brúka tey til kann verða spurt! At venda okkara fræga spælara Toda Jonsson bakið og ynskja hann at piparið grør, tí hann ikki hevur viljað spælt fyri tjóðarlandsliðið í seinastu er lítið uppbyggjandi. Hví ikki heldur lata farið vera farið og heldur hyggja frameftir. Leggja gamalt agg aftur um okkum. Hvar tað so enn finst. Og ístaðin royna at síggja nýggjar møguleikar í framtíðini.

Tað skal vera okkara vón, at FCK vinnur donsku kappingina og harvið tryggjar føroyska spælaranum møguleikan at royna seg millum heimsins frægastu – við tí hjáúrsliti, at hann á henda hátt eisini kann vera við til at skapa áhuga fyri føroyskum fótbólti sum heild.

Í slíkari støðu kann hann so fáa ta so týðandi altjóða rutinuna og avbjóðingina, sum allir góðir spælarar hava brúk fyri. Og eyndast tað, kann hann so gerast ein sera góður ambassadørur fyri okkum øll – og hvør veit – tað kann so kanska eisini vera lykilin til ta hurðina, sum kanska longur stendur á glopp – fyri Toda at koma á aftur landsliðið.

Og kundi slík gongd latið dyrnar upp fyri einum nýggjum og bjørtum samstarvi millum okkara landslið og føroyska spælaran í Danmark, tá kundi hent, at vit aftur sóu hann á landsliðnum. Koyr á Todi. Koyr á landsliðið. Farið er farið. Vit mugu byggja brýr og hyggja frameftir. Tað er at geva tí einstaka møguleikar, og tað er at sameina allar góðar kreftir. Góðan dyst Todi og góða kapping víðari á leikvøllunum í Evropa og vónandi eisini á framtíðar føroyskum landsliðum, sum fara at hava brúk fyri øllum góðum kreftum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Heimsins besta fiskiveiðiskipan?

**Rúni Hentze**



Undir kreppuni var ein sokallaður skipanarbólkur settur, sum skuldi finna útav, hvussu ein hóskandi floti skuldi síggja út. Hesin bólkur vildi kortini ongantíð loysa henda setning. Men tað sum hesin skipanarbólkur ikki setti seg føran fyri at loysa, tað loysti kreppan. Eftir at skip vóru farin á heysin, og konkurslógin aftur var sett í gildi, vóru Føroyar eftir kreppuna í teirrri hepnu støðu, at vit høvdu ein flota, sum hóskaði til grunnar okkara. Samansetingin var eisini sera hóskandi, og økisfriðingarnar, sum settar vóru í verk gjørdu, at fiskiskapurin hevur farið fram undir ógvuliga vælskipaðum viðurskiftum. Teir ymsu veiðihættirnir hava kunnað roynt uttan at órógva hvør annan, og úrslitið hjá øllum bólkum hevur verið gott.

Í seinastuni er tó komið undan kavi, at henda skipan hevur verið undirgrivin á ymsan hátt við sera tilvildarligari og óseriøsari umsiting. Tveir fyrispurningar í tinginum viðv. samanlegging av fiskiloyvum, annar frá undirritaða viðv. samanlegging tvørturum høvuðsbólkaranar partrolarar/lemmatrolarar og hin frá Torbirni Jacobsen viðv. samanlegging tvørturum høvuðsbólkarnar útróðrarbátar/línuskip, hava prógvað hetta. Í lógini stendur, at kunngerð skal gerast sum sigur hvussu mannagongdin skal vera, tá veiðiloyvir verða samanløgd. Henda kunngerð verður kortini ongantíð gjørd. Ístaðin verða loyvir løgd saman sum best ber til, og eftir reglum, sum nú einaferð hóska best til givna førið.

Tað grovasta dømið hesum viðv. er málið um Jógvan S, har ein frymil verður brúktur, sum far roknistykkið at ganga upp, hóast tað veruliga veiðitrýstið verður fleirfaldað. Hetta verður gjørt við at kvadratrótin verður tikin av rúmdini á Ågot. Soleiðis verður samsvar millum rúmdina sum fer út og rúmdina sum kemur inn í flotan. Fiskimálastýrið hevur skyldu at greiða alment frá grundarlagnum fyri hesi útrokning. Ein annar spurningur sum kundi verið áhugaverdur at fingið svaraðan er, um fiskimálastýrið hevur loyvi til at gera sínar egnu mannagongdir, tá lógin sigur, at hetta skal gerast við kunngerð.Enn er ongin frágreiðing komin frá fiskimálastýrinum um, hví kvdratrótin er nýtt. Og til henda frágreiðing fyriliggur, má ein ganga út frá, at einasta grundin til henda roknihátt er, at fáa roknistykkið at ganga upp. Fyrispurningarnir viðv. Ågot og Skorðabergi hava fingið fiskimálastýrið upp úr stólinum, so teir endiliga hava gjørt kunngerðina um mannagongdir, tá veiðiloyvir verða løgd saman. Verður henda kunngerð brúkt í Ågotmálinum, hevði veiðitrýstið verið fleirfaldað.. Tað er heldur ongin meining í, at onki skott er millum bólk 3 og 4. Her má broyting gerast í lógina, sum ger greitt, at bólkur 4 umfatar bátar upp til 110 tons, ella er ætlanion at beina fyri útróðrarflotanum?

Greiðar reglur mugu gerast, sum forða fyri, at skip verða løgd saman millum høvuðsbólkarnar, tí annars fer javnvágin í fiskidagaskipanini av lagi,og tað má fyribyrgjast, tí veruleikin er tann, at %-býtið, sum ásett er í lógini hevur passað ótrúliga væl til tað veruliga fiskaríið, og henda javnvág er heilt vist ein av orsøkunum til, at fiskiskapurin hevur hepnast hjá øllum bólkum, uttan at skaða fiskastovnarnar.

Tí er umráðandi, at skipanin ikki verður undirgrivin við, at javnvágin í teimum ymsu bólkunum verður órógvað, soleiðis sum vit hava sæð í seinastuni. Heldur hetta lagið fram gongur ikki long tíð, til vit ikki longur kunnu reypa av heimsins bestu fiski-veiðiskipan. Tí styrkin í skipanini er, at veiðiorkan er fastløst og skipað í høvuðsbólkar. Hetta, saman við økisfriðingunum, hevur stabiliserað fiskiskapin. Ásetingin av fiskidøgum hevur ikki tann avgerandi týdningin, so sum mong tykjast at halda, tí veruleikin er tann, at fiskiskapurin hesi árini er farin fram so at siga ótarnaður av fiskidøgum. Tað er bert bólkur 5 b, sum hevur merkt nakað serligt til, at fiskidagarnir eru avmarkaðir.

# Verkfallið rakti Føroya Bjór meint

**Stjórin, sum sjálvur noyddist at bryggja fyri at halda lív í gerini sigur, at bryggjaríið í Klaksvík kortini klárar at halda tænastustøðið**

BRYGGJARÍ
*Tíðindaskriv*

Verkfallið rakti eisini Føroya Bjór meint. Sjálvt um roynt var at leggja uppfyri, og fylla allar goymslur, so var næstan onki eftir ta síðstu vikuna.

– Ongin hevði roknað við, at tað fór at taka 4 vikur. Hetta er nokk fyrstu ferð, at fólk ringdu og klagaðu um at ongin Veðrur var eftir í Rúsuni í Havn. Sodavatnið var skjótt uppi, og flestu handilshillar og køliskáp blivu tóm, siugr Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór.

Maskinurnar stóðu sjálvandi stillar í 4 vikur. Onkur var tó noyddur til at arbeiða, t.d. mátti stjórin fara at bryggja fyri at halda lív í gerini.

Frá fyrsta arbeiðsdegi eftir verkfallið hevur verðið arbeitt í tveimum vaktum á Føroya Bjór, nú sæst ljós fyri framman, og í komandi viku rokna tey við at hava allar vørur á goymslu aftur.

– Hetta kom ógvuliga illa við í hásesong og inn í feriutíðina, men við einum eyka innsatsi sær tað út til at fara at ganga, so Føroya Bjór klárar at halda sítt høga tænaststøði eisini hetta summarið, sigur Einar Waag.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Nýggj kloakkskipan ávegis

**Tórshavnar Býráð hevur fingið trý tilboð um kloakkarbeiðið frá úti á Bakka og inn í Vágsbotn. Lægsta boðið liggur beint undir 1,4 millión krónur. Væntandi verður farið undir arbeiðið 11.august**

KLOAKKSKIPAN
*Páll Holm Johannesen*



*Ætlanin er byrja arbeiðið við nýggju høvuðskloakkini við Vágsbotn 11.august. Hon verður løgd millum húsini og bryggjukantin.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Bæði lands- og kommunalir myndugleikar í umhvørvismálum hava rættiliga verið í andglettinum seinasta árið. Síðan umhvørviskanningin av dálkingarnøgdini av vakstrarhúsgassum staðfesti, at føroyska umhvørvið ikki er av teimum reinastu, hava fleiri tilburðir á umhvørvisøkinum verið í ljósmála í føroysku fjølmiðlunum. Í miðstaðarøkinum hevur serliga verið varpað ljós á teir mongu oljulekarnar seinastu tíðina, sum hava dálkað Havnarvág illa.

### Ein høvuðskloakk

Feskasta dømi um umhvørvisdálking í miðstaðarøkinum var hósmorgunin, tá gongubreytini við Vágsbotni fleyt í óhumsku. Helst var orsøkin ein feilur í einari av kloakkskipanunum frá úti Bakka og inn í Vágsbotn. Kloakkskipanin við húsini á Vestaruvág er gomul, og sambært Teknisku deild hjá Tórshavnar Býráð kunnu lætt trupulleikar standast av skipanini.

Kloakkirnar eru nakrar av teimum elstu í Havnini, og skipanin er ótíðarhóskandi. Húsini liggja tøtt, og tískil er sera torført at umvæla, um trupulleikar íkoma. Kloakkskipanin er býtt í átta frárensl, sum øll renna út í Vágsbotn. Á Tórshavnar Býráð hava tey leingi verið varug við støðuna á Vestaruvág, og eftir summarfrítíðina verður farið undir at gera nýggja kloakkskipan. Fyrsta stigið er á leiðini frá úti á Bakka og inn á Vágsbotn.

Tað skal gravast ein stór nýggj kloakkleið millum húsini og keiina, sum skal savna øll átta frárenslini í eina høvuðskloakk. Kloakkskipanin verður útgjørd við einari pumpu, sum skal pumpa mannatrekkin í eina nýggja leið, sum skal niðan í Havnará, og ætlandi endar yviri við Strond við Sergeant víkina. Við Sergeant víkina er streymhart økið, og tískil verður mannatrekkurin førdur til havs. Stóri trupulleikin í Vágsbotni hevur verið, at har er eingin streymur, og tískil fer mannatrekkurin ikki úr økinum, men verður verandi við bryggjukantin. Hesin trupulleiki verður loystur við nýggju kloakkskipanin.

Nýggja kloakkleiðin frá úti á Bakka og inn á Vágsbotn er liður í einari størri ætlan at betra um kloakkviðurskiftini í høvuðsstaðnum Næsta stigið verður grava eina stóra kloakkleið frá Bøkjarabrekku og niðaneftir Jóanesar Paturssonargøtu.

### Trý tilboð

Tað eru í løtuni trý feløg um boðið til at gera kloakkarbeiðið við Vestaruvág fyri Tórshavnar Býrað. Býráðið vil ikki upplýsa, hvørji feløg talan er um, men einans, at lægsta tilboðið liggur beint niðanfyri 1,4 millión krónur

Tórshavnar Býráð hevur sett tvær milliónir av til kloakkarbeiði á fíggjarlógini í ár, og á Teknisku deild vænta tey, at allur peningurin verður nýttur. Umframt byggikostnaðin, fer peningur eisini til projekt, eftirlit og ókendar orsøkir, sigur Tekniska deild á Býráðnum. Við nýggju kloakkskipanini er sostatt líkt til, at broddurin verður tikin av harðrenda kjakinum um tey bleytu virðini í samgonguni í Tórshavnar Býráð...




*Her er nýggja høvuðskloakkin frá úti á Bakka og inn í Vágsbotn avmyndað. Á kortinum sæst, at kloakk leiðin fer at ganga frá Havnará heilt út á Bakka. Við hjálp av pumpum fer mannatrekkurin frá húsunum á Vestaruvág verða førdur niðan í Havnará, og víðari út í Sergeant víkina. Á myndini eru pumpurnar merktar P1 og P2*

Ferðsluvanlukka í Gøtu:

# Stendur um lív



*Hóskvøldið var ein álvarsom ferðsluvanlukka í Gøtu. Tveir bilar rendu á hvønn annan, og annar endaði á niðanfyri landsvegin.*

*Mynd: Jonhard Hammer*

**Enn hevur løgreglan ikki staðfest orsøkina til ferðsluvanlukkuna hóskvøldið, men nakað bendir á, at talan var um nógva ferð.**

FERÐSLUVANLUKKA
*Páll Holm Johannesen*

Seint hóskvøldið hendi ein álvarsom ferðsluvanlukka í Gøtu. Ein bilur við tveimum ferðandi var á veg úr Fuglafirði til Runavíkar, og við svingið á landsvegnum við Gøtukirkju misti førarin tamarhaldið á bilinum.

Bilurin rendi frontalt á ein annan bil, ið kom koyrandi frá Syðrugøtu. Bilurin, ið kom úr Syðrugøtu endaðu í niðanfyri vegin við parkeringsplássið uttanfyri Losjuna. Báðir bilarnir gjørdust vrak. Tey trý fólkini, ið vóru í bilinum úr Syðrugøtu sluppu við smærri snuddum, meðan verri stendur hjá 0teimum báðum, ið vóru úr bilinum í Fuglafirði. Hjá øðrum stendur um lív, meðan hin breyt bæði bein og arm.

Av løgreglustøðini í Runavík verður sagt, at tey vita ikki, hvat orsøkin var til ferðsluvanlukkuna, men helst var talan um ov nógva ferð. Landsvegurin í Gøtu er slitin, og vegurin var vátur, og tískil vóru ikki bestu koyrilíkindi hóskvøldið.